# Kunnu bowla í næsta mánaði

**Arbeiðið við nýggju bowlinghøllini í Leirvík gongur væl, og væntast kann, at henda kann lata upp seinast í næsta mánaði**

SPÆL
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Leirvík:** Leygardagur 29. oktober 2005.

Tað er dagurin, sum Ólavur Olsen og onnur í Leirvík bíða spent eftir.

Gongst sum ætlað, so kann hann henda dagin lata upp dyrnar fyri almenninginum til ta nýggju bowlinghøllina í bygdini.

Hóast tað er enn er nakað av tíð til henda dag, so er longu stórur áhugi manna millum fyri hesi høllini.

– Tað eru nógv fólk sum spyrja meg um ymiskt við hesi høllini, og ikki minst, nær vit fara at lata upp.

– Tað stuttliga er, at tað er ikki bert fólk higani úr oynni sum spyrja, men eisini ein hópur av fólki úr Norðoyggjum, sigur ein spentur Ólavur Olsen.



*Ólavur Olsen er spentur eftir degnum, tá bøwlinghøllin fer at lata upp. Umstøðurnar eru góðar til slíkt spæl*

## Pólsk arbeiðsmegi

Týsdagin kom ein stór bingja í túnið, nærhendis Statoil-støðini í Leirvík, har henda høllin eisini stendur.

Í bingjuni var alt tilfarið og øll útgerðin, sum skal nýtast til hesa høllina.

Inni í høllini eru vítt til veggja og høgt til lofta, og tí er gott pláss hjá fólki at bowla á teimum seks breytunum, sum verða í høllini.

Fýra mans úr Polen, og sum hava drúgvar royndir við júst slíkum høllum, eru eisini komnir til Føroyar at seta upp hesa høllina.

Tá bingjan var komin í túnið, fóru teir beinanvegin til verka við at taka útgerðina inn í høllina og síðani seta hana alt upp.

Gongst sum ætlað kann høllin tí lata upp 29. oktober. Lítil ivi man vera um, at nógv folk fara at vitja hesa høllina – í fyrstu syftu mest eysturoyingar, og seinni í hópatali av norðoyingum, tá undirsjóvartunnilin fer at lata upp komandi ár.



*Pólendiingarnir eru farnir til verka, og eru byrjaði at seta upp útgerðina til tær seks breytirnar í høllini*

# Lítil skúli við framtíð

**Veðrið var av tí allar fagrasta, tá vit týsmorgunin stukku inn á gólvið í Mikladals skúla. Eitt lítið hús við einari hugnaligari stovu**

SKÚLAGONGD
*Katrina Eyðunsdóttir Hansen/*
*Elsa Maria H. Hansen*



*Teir átta næmingarnir í Mikladals skúla: Fremst v.m. Marget Heldarskarð, Mikladalur, Marta Heldarskarð, Mikladalur, Alfred Eyðunsson, Trøllanes, Jóhannus Kalskar Joensen, Trøllanes. Aftasta v.m. Jens Jón Andreasen, Mikladalur, Eivindur Eyðunsson, Trøllanes, Asta Østerø, Trøllanes, Miriam í Norðnastovu, Mikladalur. Ímillum tey stendur Magna Auðunsson, lærari*

Mynd: Jens Kr. Vang

Tey vóru í holt við næst síðsta skúlatíman á degnum. Í søgutímanum henda dagin sótu tey og loystu uppgávur um veiðimannasamfelagið.

Vit fingu okkum eitt prát við lærarinnuna Magnu Auðunsson, ið hevur starvast har síðan ár 1993. Hon fortaldi um hvussu vanliga skúlagongdin er.

Í alt ganga 11 næmingar í skúlanum. Dagurin er býttur upp í tveir partar. Um morgunin eru næmingar frá 1.-3. flokki í skúla. Har eru einans tríggir næmingar í hesum aldursbólkinum. Tá teirra skúladagur er lokin, koma teir eldru næmingarnir frá 4.-7. flokk í skúla. Har eru átta næmingar, helvt um helvt av hvørjum kyni. Næmingarnir eru bæði av Mikladali og Trøllanesi.



*Skúlin í Mikladali er lítið, men hugnaligur*

Mynd: Jens Kr. Vang

## Skúli og frítíð

Hvønn mánadag fara børnini til Klaksvíkar at svimja. Hetta dáma teimum avbera væl, og eftir at hava verið ein heilan dag í Klaksvík, gongur leiðin aftur til Kalsoynna, og síðani sleppa børnini til hús.

Magna segði eisini, at allir næmingarnir høvdu sjálvandi ikki sama fak í sama tíma, vegna aldursmunin. Summi kunnu t.d. hava alis-/evnafrøði, meðan onnur samstundis hava søgu. Men Magna roynir at býta hetta upp sum frægast.

Skúlin hevur ongan skúlagarð, so í fríkorterinum eru børnini bara uttanfyri og spæla. Vit tosaðu eisini við næmingarnir um skúla og frítíð. Í frítíðini rulliskoyta og súkkla tey nógv, tey eru ofta fleiri. Eisini spæla tey ofta bólt á tí lítla graslíkisvøllinum í bygduni. Um ringt veður er, plaga tey at vera inni, har tey spæla teldu ella hyggja eftir sjónvarpi.

Ofta er vandi fyri at skúlarnir í teimum heilt smáu bygdunum í Føroyum verða niðurlagdir, av tí at næmingatalið er ov lítið. Næsta ár fara tveir næmingar víðari í framhaldsdeildina. Men í skúlanum í Mikladali er enn vón fyri framman, har eru nú heili seks gentur undir skúlaaldur.